

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 06 - 2013

# Tey grønu í ES vilja steðga oljuboringum í Grønlandi

Av ótta fyri eini umhvørvisvanlukku vilja politikarar frá tí grøna bólkinum í ES-tinginum, at boring eftir olju í Grønlandi verður steðgað. Bólkurin er farin undir eina herferð fyri at steðga boringunum skriva útlendskir miðlar. Tað er rætt og slætt ov váðiligt at bora eftir olju og gassi í Grønlandi, og tí má hetta steðgast, heldur Margrete Auken (SF), sum úttalar seg vegna Grøna Bólkin í Europa-tinginum. Tað líkist ongum at bora í Vesturgrønlandi, og tað er ábyrgdin hjá Danmark og Grønlandi at steðga øllum boringum, sigur hon við MetroXpress og undirstrikar, at nógv lond fylgja boringunum og eru sera óttafull um eina møguliga oljuvanlukku. Tí hevur Grøni Bólkurin sett í gongd eina herferð, sum hevur til endamál at seta fokus á málið og boring í Arktis, sum oljuvinnan væntar sær so nógv av tey næstu árini. Bólkurin heldur, at tað er ikki einans Danmark og Grønland, sum hava ábyrgd av at steðga boringunum. Allur heimurin hevur ábyrgd av at siga frá, nú oljufeløg hava fingið loyvi til at bora í einum øki, har vandin fyri eini vanlukku er hægri enn aðrastaðni í heiminum, skrivar MetroExpress. Víst verður á, at tað er veruliga orsøk til at vera órólig, tí hvørki Danmark ella Grønland eru før fyri at standa ímóti oljufeløgunum og teirra royndum at sleppa undan øllum teimum neyðugu trygdarásetingunum, tá tey eru farin at bora sigur Margreta Auken. Danska blaðið skrivar eisini, at sjálv tilbúgvingin hjá oljufeløgunum, sum ætla at bora í Grønlandi komandi árini, er ikki nøktandi. Gongur galið við boringunum, so hevur Danmark als ikki orku til at bjarga umhvørvinum frá 5000 tonsum av ráolju, og hetta er ikki nokk, tá ein veruligur oljuleki í økinum lættliga kann vera uppá 30.000 tons skrivar MetroExpress. Lekar frá royndarboringum eru oftani sera ógvusligir og kunnu røkka 30.000 tonsum um dagin. Talan kann gerast um eina umhvørvisvanlukku, sum vit als ikki eru før fyri at ímynda okkum, sigur Kai Sørensen, fyrrverandi varastjóri í Geus,

sum er almenni danski stovnurin fyri jarðfrøðiligar kanningar í Grønlandi, við MetroExpress. Bæði franska oljufelagið Total og tryggingarfelagið Lloyd´s hava fyrr verið sera ivasom um at loyva boringum í Grønlandi. Eisini frá øðrum síðum gongur harðliga á og er móttøðan móti boringum vaksandi. Ein vanlukka verður øgilig. Boringin má steðgast, tí tað er høpisleyst at bora í einum øki, har tað eingi borifeløg eru, sum hava neyðugu boritøknina til at gera arbeiðið trygt. Soleiðis ljóða ávaringarnar frá oljuserfrøðinginum Sigurd Solem, sum er stjóri í Dansk Geotermi og er ráðgevi fyri boriverkætlanir við serstøkum speciali í boritøkni og trygd. Sigurd Solem, sum er fyrrverandi boristjóri hjá Maersk, ið hevur borað fleiri staðni í heiminum, heldur, at hvørki Danmark ella Grønland hava neyðugu vitanina til at stýra trygdarviðurskiftunum kring tær váðafullu royndarboringarnar. Grønland hevur longu givið fleiri oljufeløgum loyvi at bora eftir olju og ringast av øllum er sambært tí roynda boriserfrøðinginum, at tøknin at bora í ísi er als ikki til steðar. Eg skilji ikki, at borifeløgini hava fingið loyvi at bora, tá tøknin til at bora í ísi als ikki er til, so vandi er fyri, at har fara at henda vanlukkur og nógv størri enn tær aðrastaðni. Og her eru isfjølllini ein stórur vandi sigur Sigurd Solem til MetroExpress. Og hendir ein vanlukka verða avleiðingarnar ófatiliga nógv størri og ræðuligari, tí øll tann arktiska vistfrøðiskipanin fer ongantíð at kunna blíva tann sama og verður verandi oyðiløgd fyri altíð heldur hann. Eisini hjá Greenpeace heitir talsmaðurin Niels Fuglsang á at steðga boringunum. Orsakað av lága hitanum kann oljan ikki guva burt sum aðrastaðni.